So danskt so gott

Sprongd dunnubringa er eitt spennandi alternativ til frokostar um jólini
Mynd: Álvur Haraldsen

Tað er við at venda, men maturin til føroysku jólaborðhaldini er stórt sæð danskur, sigur Uni Gullfoss, kokkur á Hafnia

JÓLABORÐ
Heri á Rógvi
heri@sosialurin.fo

Maturin til jólaborðhaldini í Føroyum er í alstóran mun danskur.

Tað er tað kundarnir vilja hava, ljóðar tað frá Una Gullfoss, kokki, sum fer at gera jólaborðhaldsmat til eini 1.000 fólk í november og desember.

Hann stendur einari strævnari tíð á møti, men tað kundi væl verið meira avbjóðandi fyri hann sum kokk.

- Tað er øgiliga nógv tað sama – og øgiliga nógv danskt við ymsum føroyskum blandaðum uppí, sigur Uni Gullfoss.

Vit hava biðið hann um at gera eitt alternativan rætt til jólaborðhaldini. Væl vitandi at dunna skal vera við á borðinum, so valdi Uni at gera sprongda dunnubringu, sum hevur ligið í salti í eitt samdøgur og er glaserað við hunangi og sukuri.

- Tað smakkar nógv betri. Tað verður eisini saftugt og spennandi, sigur Uni Gullfoss.

Dunnan skal við

Maturin til eitt jólaborðhald skal fyrst og fremst fylla nógv. Jólafrokosturin skal helst ikki gerast alt ov dýrur.

- Tað vísir seg ikki at rigga at servera eitt nú tríggjar rættir. Tað skal fylla nógv, og tí verður tað oftani til eitt sjálvtøkuborð, sigur Uni Gullfoss.

Hann hevur eisini lagt til merkis, at tað hevur vundið upp á seg við jólaborðhaldum. Men so at siga øll velja at lata grýturnar standa í skápinum heima í køkinum.

- Tað er vorðið bíligt at fara út at eta, og tí velja so at siga øll entin at keypa mat útifrá ella at fara út at eta matin, sigur Uni Gullfoss.

Hóast ung og eldri ikki eru samd um, hvat eigur at vera við á borðinum, so eru øll samd um eitt:

- Tekur tú dunnuna av jólaborðinum, so selir tú einki, sigur Uni Gullfoss.

Vildi havt føroyskt

Hevði tað staðið til Una Gullfoss sjálvan, so vildi sjálvstøkuborðið til ein frálíkan jólafrokost verið á tremur við føroyskum mati.

- Eg hevði viljað havt seyðarhøvd og blóðpylsu við. Tað er sesong fyri tí, og tað er gamal siður í Føroyum at eta tílíkar rættir, sigur Uni Gullfoss.

Ymiskir føroyskir rættir eru á flestu borðum til jólafrokostarnar, men tað eru fáir føroyskir burturav.

- Haldi gongdin í Føroyum er við at venda, men vit eru eini 3-5 ár aftanfyri Danmark tí viðvíkjandi at ganga nýggjar leiðir.

Tískil eru vit oftani meira donsk enn danskarar sjálvir, tá tað snýr seg um at eta jólafrokost.